# Depilin á Skálagarði – Samandráttur frá eftirlitinum

Skálagarður **í** Klaksvík er ein bú-, umlættingar- og endurmenningardepil, sum lat upp í apríl 2023. Tilboðið er ætlað vaksnum við seinheilaskaða úr øllum Føroyum. Endamálið er at geva húsfólkunum møguleika fyri mest møguligum sjálvbjargni, trivnaði og menning, í einum tryggum og virðiligum umhvørvi.

**Trivnaður og menning hjá húsfólkunum**
Trivnaðurin hjá húsfólkunum er yvir miðal, og dentur verður lagdur á, at skapa tryggleika, felagsskap og virðing í samskiftinum. Leiðsla og starvsfólk leggja seg eftir, at Skálagarður er ein endurmenningardepil, har húsfólk verða ment bæði likamliga og sosialt. Avvarðandi eru fegin um hugnaliga umhvørvið og vinarligu starvsfólkini, men ynskja fleiri felagstiltøk og meira lív í húsinum.

**Fakliga arbeiðið hjá starvsfólkum**
Starvsfólkabólkurin er tvørfakligur, og arbeiðið byggir á KRAP og endurmenning í gerandisdegnum. Starvsfólk hava viðkomandi førleikar, men eftirlitið staðfestir ein tørv á, at styrkja vitanina um seinheilaskaða og vitanina um, hvussu arbeitt verður við fólki, ið bera sorg um støðuna, tey nú eru í og missin, ið komst av skaðanum, tey hava fingið. Supervisjón og eftirútbúgving eru virkin partur av fakligu menningini.

**Ætlan og virkisætlan**
Ætlanirnar fyri einstaka húsfólkið eru gjørdar í tráð við løgtingslógina um almannatrygd og tænastur. Virkisætlanir vísa hvørji mál hvørt húsfólk hevur, men eftirlitið metir, at ætlanirnar kunnu gerast meira samanhangandi og einsháttaðar.

**Arbeiðshættir og háttalag**
Arbeiðshættirnir eru grundaðir á KRAP og endurmenning. Starvsfólk eru tilvitað um, at dentur skal leggjast á eitt friðarligt og trygt umhvørvi, og at arbeiðið verður lagað til málbólkin. Tó eigur faklig vitan um seinheilaskaða at styrkjast, og felags námsfrøðiligi arbeiðshátturin eigur at verða skipaður betri fyri at tryggja samanhang og støðugleika í arbeiðinum.

**Organisatión og leiðsla**
Leiðsluskift hava merkt tilboðið, men nýggja leiðslan tykist hava skapt støðugleika og fylgiskap. Eindarleiðslan og staðbunda leiðslan hava viðkomandi førleikar, og starvsfólk lýsa leiðaran sum lurtandi og rúmligan. Ábyrgdarbýtið millum leiðslu og kontaktpersónar eigur tó at dagførast og gerast meira greitt. Leiðslan leggur dent á trivnað og samstarv og arbeiðir miðvíst við, at styrkja felagsskapin og menna starvsfólkabólkin.

**Tilmælir og áheitanir frá Eftirlitinum**

Í sambandi við eftirlitsvitjanina gav Eftirlitið Almannaverkinum fylgjandi tilmælir:

*Mælt verður til at kanna, hví starvsfólk & leiðari og húsfólk & avvarðandi ikki hava heilt somu fatan av trivnaðinum og menningini hjá húsfólkunum. Serliga sóknast húsfólk og avvarðandi eftir betri venjing, tá ið talan er um menning.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Í næstum verður farið undir at avstemma væntanirnar hjá øllum pørtum, til hvat liggur í venjing og menning.

*Mælt verður til, at kontaktfólk og avvarðandi hava regluligar fundir, har húsfólkini eftir førimuni kunnu vera við.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Fundir eru javnan við avvarðandi. Í samráð við avvarðandi, og har tað ber til, eru eisini húsfolkini við. Arbeitt verður við at skipa hesir fundir, so teir vera meira regluligir og skipaðir frameftir.

*Mælt verður til at geva avvarðandi betri felagskunning.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Almannaverkið fer undir at kanna, hvussu felagskunning kann gerast betri.

*Mælt verður til at hava statusfundir í yvirlappinum millum vaktir, og at finna eina góða skipan at stýra hesum fundum eftir.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Arbeitt verður við at gera ein fundarleist til statusfundirnar, so at hesir verða betri skipaðir frameftir.

*Mælt verður til at kanna óhepnar støður, sum hava verið, neyvt og skrivliga. Eisini skulu leiðreglur gerast um, hvussu best møguligt er, at fyribyrgja líknandi støðum frameftir. Til dømis kundi ein einfaldur frágreiðingsfrymil verið, sum skal nýtast, tá ið slíkar óhepnar støður hava verið, har standa skal, hvat mann hevur lært av støðuni, og hvussu sleppast kann undan líknandi støðum í framtíðini.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Núverandi leiðsla í tilboðnum er ikki vitandi um onkrar av teimum óhepnu støðunum. Møguliga eru hesar hendar, áðrenn núverandi leiðsla er komin til. Arbeiðið er í dag skipað soleiðis, at tað verður hugt inn til húsfólkini minst tvær ferðir hvørja nátt fyri at fyribyrgja óhepnar støður. Mannagongdir eru eisini fyri hesum, og hvussu fylgt verður upp og tillagað. Harafturat eru kallitól, og starvsfólkini eru undirvíst í, hvussu hesi virka.

*Mælt verður til at gjølla verður hugt at bæði bygninginum og økinum uttan um, við eini meting um, um atlitið til námsfrøðiliga innihaldið er nøktandi í innrættingini av tilboðnum. Til dømis er týdningarmikið at vera varðin, tá ið innrættað verður, og tá ið innbúgv verður keypt, so sum spísiborðsstólar.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Farið verður undir at kanna, hvat kann gerast við økið uttanfyri. Arbeitt verður fyri námsfrøðiliga innihaldinum í innrættingini, og at nøktandi tillagingar vera gjørdar, um avbjóðingar vísa seg.

Sum dømi kann nevnast, at farið verður undir at gera tað týðiligari, hvar í bygninginum ein er staddur, møguliga við tølum ella litum og kunning um, hvat er á hvørjari hædd.

So hvørt tað síggjast avbjóðingar hjá borgarum, verður innrættingin lagað til tørvin hjá borgarunum. Flestu borgarar hava t.d. stólar og borð, sum eru nágreiniliga tilpassað teirra tørv.

*Mælt verður til at gera virkisætlanirnar enn betri, serliga hjá teimum, sum hava búpláss.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Mentur er ein góður leistur til at gera virkisætlanir til húsfólk, sum eru í avklárandi fyriskipan. Arbeitt verður við at fáa ein líknandi leist til húsfólk, sum eru fastbúgvandi.

*Mælt verður til, at starvsfólkini fáa styrkt teirra vitan um seinheilaskaða skjótast gjørligt; eftirlitsfólkini meta, at henda vitan eisini vantar á øðrum tilboðum hjá Almannaverkinum og mæla til, at Almannaverkið sum ein felags organisatión ger felags átøk og átøk á tilboðum.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Undirvísing um heilaskaða er sett í verk.

*Mælt verður til at gera ábyrgdarbýtið millum leiðara, kontaktfólk og starvsfólk greitt. Mælt verður eisini til, at skjølini um endurvenjing og umlætting verða liðugt skrivaði.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Farið er undir at seta orð á ábyrgdarbýtið millum leiðara, kontaktfólk og starvsfólk. Skjølini um endurvenjing og umlætting eru í prosess, ein bólkur er settur at gera tey liðug.

*Eingin áheitan verður givin.*